UTTAN ÚR HEIMI

## Alkoholreklama skjótt loyvd

Eins og í Føroyum er tað bannað at lýsa við rúsdrekka og øli í Noregi, men sambært einum løgfrøðiprofessara og einum fyrrverandi eftirlitsmanni hjá EFTA er tað ikki vist, at bannið verður galdandi so leingi afturat.

Per Christiansen, sum er professari í løgfrøði á lærda háskúlanum í Tromsø, sigur við Aftenposten, og norska bannið ímóti alkoholreklamu hongur í einum klønum tráð. Hann vísir á eitt mál í Svøríki. Har stevndi ein matstova myndugleikunum, tí hon slapp ikki at lýsa við rúsdrekka. Matstovan vann sakarmálið, tí rætturin kom til ta niðurstøðu, at bannið var ikki í samsvari við ES-reglur. Professarin ivast ikki í, at ger ein norsk matstova tað sama, fer hon eisini at vinna eitt tílíkt mál í norska dómsvaldinum. Í vikuni frættist, at ein norsk matstova umhugsar at almannakunngera eina alkoholreklamu fyri at sleppa at royna bannið.

Hann er ikki einsamallur um hesa áskoðanina. Knut Almestad, sum hevur verið formaður í teirri eftirlitsnevndini hjá EFTA, sigur, at grundreglurnar í EBS-samstarvinum eru oman fyri norska lóg, kemur tað til skarpskeringar.

## Umhugsa rakettverju

Ein viðgerð í amerikonsku kongressini kann gerast dýr fyri tey flogfeløgini, sum flúgva til og úr USA og sostatt eisini tað skandinaviska SAS.

Málið snýr seg um at krevja, at flogfeløgini skulu seta eina serliga rakettverjuskipan í flogførini, sum flúgva til og úr USA. Sum er hava hernaðarflogfør eina skipan, sum sleingir eitt ótal av aluminiumspettum frá sær, tá ein rakett er á veg ímóti tí. Pettini órógva rakettina, so hon fer aftan á teimum heldur enn flogfarinum. Tað er eina slíka skipan amerikanska kongressin umhugsar at krevja í ferðamannaflogførum. Sum er er tað bara ísraelska flogfelagið El Al, sum hevur hesa útgerðina í sínum flogførum.

Enn hevur SAS ikki fingið boð um at gera nakað slíkt, og leiðslan í felagnum dylir ikki fyri, at hetta verður ein dýr íløga, skal hon fremjast. Víst verður á, at tá SAS setti skottryggar hurðar í flogførini av slagnum Airbus, máttu tey takast úr flúgving í átta dagar.

## Sjáldsamt verkfall

Sparingar í franska uttanríkisráðnum kunnu hava við sær, at franskar sendistovur um allan heimin verða stongar mánadagin.

Starvsfólkini á sendistovunum siga, at sparingarnar fara at raka alt virksemið á øllum sendistovum og konsulátum, og tey seks fakfeløgini, sum umboða starvsfólkini, boðaðu hósdagin frá, at broytir stjórnin ikki ætlanina, fara starvsfólkini í verkfall mánamorgunin. Upprunaliga var ætlanin, at bara starvsfólkini í uttanríkisráðnum í París skuldu leggja arbeiðið niður, men hetta er nú víðkað til eisini at umfata tey, sum arbeiða á sendistovum og konsulátum uttanlands.

Eftir ætlanini hjá fíggjarmálaráðnum skulu 200 milliónir krónur sparast. Fakfeløgini siga, at í veruleikanum merkir tað, at reallønin hjá starvsfólkunum fer at minka, og tað góðtaka tey ikki.

## Gibson í øðini

Tann kendi filmsleikarin Mel Gibson umhugsar at leggja sak ímóti amerikanska blaðnum New York Post, tí blaðið hevur víst nøkrum átrúnaðarligum leiðarum eitt sokallað "piratkopi" av filminum "The Passion Of Christ", sum Mel Gibson hevur gjørt, og sum ætlandi kemur í biohallirnar í februar næsta ár. .

Teir átrúnaðarligu leiðararnir, sum sóu filmin, hava funnist hvassliga av innihaldinum, og filmurin hevur fingið nógva umrøðu í fjølmiðlunum.

Á New York Post halda tey seg ikki hava gjørt nakað skeivt. Talsmaðurin hjá blaðnum sigur, at tann nógva umrøðan, sum filmurin hevur fingið, vísir, at talan var um eitt slag av tíðindaflutningi, tá blaðið gjørdi av at vísa átrúnaðarleiðarunum filmin.

# Heimurin tapir bardagan ímóti AIDS

**Heimssamfelagið er í ferð við at tapa bardagan ímóti AIDS, sigur ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, sum samanber sjúkuna við hópoyðingarvápn**

AIDS
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Heimsins leiðarar mugu leggja størri dent á bardagan ímóti AIDS.

Tað var tann greiði boðskapurin hjá ST-aðalskrivaranum, Kofi Annan, í einari samrøðu við útvarpið BBC World Service í gjár. Hann heldur ikki, at teir leiðandi í heiminum vísa sjúkuni nóg stóran áhuga, og tí mælir hann fólkinum til at ávirka sínar leiðarar.

- Í summum londum er AIDS sum eitt hópoyðingarvápn, men hvat gera vit við tað, spyr Kofi Annan.

- Eg eri illur og stúrin, og eg kenni meg hjálparleysan at liva í einum heimi, sum hevur miðlarnar til at hjálpa øllum teimum sjúku, men sum ikki hevur politiskan vilja til tað, sigur hann.

Í einari frágreiðing, sum ST kunngjørdi fyri stuttum, stendur at lesa, at AIDS hevur ongantíð kravt so mong mannalív sum í ár, og at talið á smittaðum hevur ongantíð verið størri enn nú. Umleið fimm milliónir fólk eru smittað í ár, og meiri enn tríggjar milliónir eru deyð av sjúkuni. ST heldur, at umleið 40 milliónir fólk hava AIDS, tey flestu í londunum sunnan fyri Sahara, og at talið bara veksur.

# – Vit gjørdu fleiri mistøk í Irak



*Fyrradagin kom George W. Bush, forseti, óvæntað á vitjan í Bagdad, har hann takkaði hermonnunum fyri tað, teir gera í Irak*
*Mynd: Reuters*

**James Garner, sum var tann fyrsti amerikanski umsitingarleiðarin í Irak, ásannar nú, at amerikanararnir og hann sjálvur gjørdu fleiri mistøk í landinum**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

James Garner, sum er fyrrverandi generalur, kom til Bagdad tann 21. apríl. Uppgáva hansara var at standa fyri arbeiðinum at endurreisa Irak eftir kríggið. Í dag ásannar hann, at bæði stjórnin í Washington og hann sjálvur gjørdu fleiri mistøk, og at onnur mistøk eru gjørd, síðani hann fór úr leiðarastarvinum í summar.

- Vit gjørdu alt ov lítið við at kunna irakar um endamálið við krígnum, áðrenn vit lupu á. Tí fingu irakar ikki onnur tíðindi enn tey, sum eitt nú sjónvarpsstøðin Al-Jazeera bar teimum, sigur James Garner við BBC. Hann heldur eisini, at irakar áttu at havt fingið størri ávirkan og vald longu beint aftan á kríggið. Fyrrverandi umsitingarleiðarin finst eisini at eftirmanni sínum, Paul Bremer, tí hann gjørdi av at uppløysa irakska herin.

- Tað var eitt mistak. Sjálvur ætlaði eg at nýta herin í endurbyggingararbeiðinum, og avgerðin at uppløysa hann sendi fleiri hundraðtúsund menn út í arbeiðsloysi, og tað er eingin ivi um, at hetta fekk nógvar at venda sær ímóti okkara hermonnum, sigur James Garner.

Í samrøðuni við BBC nemur hann eisini við ósemjuna ímillum verjumálaráðið og uttanríkisráðið í Washington um, hvussu farast skuldi fram í Irak aftan á kríggið.

- Ein dagin eg og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, sótu á skrivstovuni, segði hann, at hann hevði hoyrt, at eg hevði ein Tom Warrick í mínari ráðleggingarnevnd. Eg játtaði og segði, at maðurin var ein sera dugnaligur embætismaður úr uttanríkisráðnum, men Rumsfeld bað meg koyra hann úr nevndini, sigur Garner við BBC.

Nógvir eygleiðarar hava víst á, at tað var eitt mistak at lata verjumálaráðið standa fyri endurbygg-ingini í Irak, og at uttanríkisráðið hevði verið betur egnað til uppgávuna.



## ÚT- OG SJÓNVARPSSKRÁ

**svf**

**Leygardagur 29. november**
**13.50** Okkara kokkar - frá hóskvøldinum
**14.15** Breddin frá hóskvøldinum
**14.30** MT frá fríggjakvøldinum
**14.45** SATSA - frá leygarkvøldinum
**15.20** Seyðamaður og granskari 1:2 - frá sunnukvøldinum
**16.00** Hvussu spæla vit okkara kort?
**16.30** Gandaspegilin
**17.00** Magic Man
**17.40** Vinir
**18.00** Toktummas 19
**18.05** Simba 3
**18.30** Pingu
**18.35** Svørðdrotningin 8
**19.20** Oggy og kakkulakkarnir
**19.30** PK og dansifólkið 4:4 - norsk røð
**20.00** SATSA - Spurnarkapping, har tað ræður um at duga at satsa.
**20.30** Løgreglumaður í barnagarðinum - am. skemtifilmur - Óhóskandi fyri smábørn
**22.15** Sopranos 12 - am. spenningsrøð - Óhóskandi fyri børn
**23.10** Boiler Room - am. spenningsfilmur - Óhóskandi fyri smábørn
**01.05** Liðugt

**Sunnudagur 30. november**
**08.00-10.00** Klokkan er átta: Morgunsjónvarp fyri børn
**08.00** Pyjamasbananir 18 & 19
**08.10** Toktummas 17 & 18
**08.20** Osvald 9
**08.30** Kúgvin Konny 1
**08.35** Eddi og Bjørn 8
**08.45** Teir reyðu jólastivlarnir
**09.10** Garasjan – Vestmanna
**09.35** Miðlingurin Malcolm 44
**10.00** Steðgur
**14.00** Klassisk konsert: Carl Nielsen - ljósið og myrkrið
**15.00** Okkara kokkar - frá hóskvøldinum
**15.25** SATSA - frá leygarkvøldinum
**16.00** Gudstænasta úr Sandavágs kirkju
**17.10** Á heimsins útryðju 4:8 - do. ferðafrásøgn
**18.00** Toktummas 19
**18.05** Mumi 35
**18.30** Krokk 4:22
**18.55** Víkingasøgan 2:2 - svensk stuttrøð
**19.50** Andakt
**20.00** Seyðamaður og granskari 2:2 - Um Helga í Brekkunum, sum granskar í seyðahaldi.
**20.40** Stoltleiki og fordómar 4:6
**21.35** Rosewood – am. aut. filmur frá 1997 - Óhóskandi fyri smábørn
**23.50** Jazzur 2003
**00.35** Liðugt

**Mánadagur 1. desember**
**17.35** D&V við teknmálstulki
**18.00** Jól á posthúsinum - Fyrsti partur av stóra jólakalendaranum - Skrivað og lagt til rættis: Páll Danielsen
**19.00** Seyðamaður og granskari 2:2 – frá sunnukvøldinum
**19.40** Ótrúligi blómuhandilin
**20.00** Dagur og Vika
**20.25** Ítróttarsendingin 3-2
**20.55** Runt sjónarringin
**21.20** Ein nýggj øld 5:6 – dokumentarrøð frá BBC
**21.50** The Agency 11:22 - amerikonsk spenningsrøð
**22.35** Lance Loud - am. dok. filmur
**23.30** Liðugt

**Rás**

**Leygardagur 29. november**
**9:45** Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
**10:00** Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár. - Innsløg, prát og tónleikur. - Sonne Smith leggur til rættis.
**11:00** Hanky Panky (1. partur) - Innsløg, prát og tónleikur. - Undirhaldssending fyri øll. - Rúni Ellingsgaard og Johan í Kollafirði eru vertir
**12:00** Lýsingar
**12:05** Hanky Panky (2. partur) - Innsløg, prát og tónleikur - Undirhaldssending fyri øll. - Rúni Ellingsgaard og Johan í Kollafirði eru vertir.
**13:00** Á Torginum (e) - Endursending frá týskvøldinum. - Svenning av Lofti hevur prát við lurtarnar.
**14:30** Tónleikur
**20:00** Beatin - Tónleikasending. - Eyðfinn Drewsen leggur til rættis.
**21:00** Tónleikur
**21:15** Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
**21:30** Tónleikur
**23:00** Liðugt

**Sunnudagur 30. november**
**9:45** Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
**10:00** Tónleikur - Blandaður gospeltónleikur.
**13:00** Kelduvaðið (EvR)
**14:00** Tónleikur
**17:00** Framhaldssøga 13. partur - Heine Lützen lesur úr bókini »Pílagrímsferðin« av John Bunyan. Victor Danielsen týddi.
**17:30** Tónleikur
**20:00** Kelduvaðið (EvR) (e) - Endursending frá kl. 13.00 í dag.
**21:00** Tónleikur
**21:15** Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
**21:30** Tónleikur
**23:00** Liðugt

**Mánadagur 1. desember**
**9:45** Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
**10:00** Framhaldssøga 13. partur - Endursending frá ígjár. - Heine Lützen lesur úr bókini »Pílagrímsferðin« - av John Bunyan. Victor Danielsen týddi
**10:30** Tónleikur
**12:00** Tíðindir og Lýsingar - Tíðindir frá Dimmalætting.
**12:15** Tónleikur
**13:00** Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum.
**14:00** Lýsingar
**14:05** Ynskiløtan (framhald)
**15:00** Lýsingar
**15:05** Ynskiløtan (framhald) - Lurtarin velur løg.
**16:00** Tíðindir og Lýsingar - Tíðindir frá Dimmalætting.
**16:15** Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith leggur til rættis
**17:00** Tónleikur
**18:00** Tíðindir og Lýsingar - Tíðindir frá Dimmalætting.
**18:15** Tónleikur
**19:00** Orð á Leiðini (EvR) (e) - Endursending frá hósdegnum. - Jógvan Zachariassen leggur til rættis.
**19:40** Tónleikur
**21:15** Orðið (e) - Endursending frá í morgun. - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
**21:30** Halleluja - Andalig tónleikasending. - Jógvan Poulsen leggur til rættis.
**22:30** Tónleikur
**23:00** Liðugt

**Týsdagur 2. desember**
**9:45** Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
**10:00** Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár. - Innsløg, prát og tónleikur. - Sonne Smith leggur til rættis.
**11:00** Tónleikur
**12:00** Tíðindir og Lýsingar - Tíðindir frá Dimmalætting.

**ÚF**

**Leygardagur 29. november**
**07.00** Tíðindi
**07.05** Morgunlestur - Emil Olsen, prestur, lesur
**07.15** Morguntónleikur
**07.30** Tíðindi
**07.35** Morguntónleikur
**08.00** Tíðindi
**08.03** Leygarmorgun í studio 5 - Arne Thomsen velur løgini
**09.00** Tíðindi
**09.03** Løg mær dámar (e) - 4. og seinasta sending hjá Rógva Rasmussen
**09.35** Dagsins tónar
**09.50** Morgunlestur (e) - Emil Olsen, prestur, lesur
**10.00** Tíðindi
**10.05** Fimleikaløtan 1
**10.10** Barnatímin - Kári Sólstein stílar fyri
**11.00** Rót og rútma - Petur Rouch velur country tónleik
**12.00** Veðurtíðindi
**12.02** Middagstónleikur
**12.15** Skráin og lýsingar
**12.20** Tíðindi
**12.40** Døgurðatónar
**13.00** Vikan ið fer - Gunnar Skúvadal skipar fyri
**14.00** Vespan (e) - Óluva Zachariasen og Dánjal Højgaard leggur til rættis
**15.00** Menuettin - Jóannes S. Hansen leggur til rættis
**17.00** Suggan - Gissur Patursson velur tónleikin
**18.00** Tónasláttur - Hans Egholm stílar fyri
**18.25** Skráin og lýsingar
**18.30** Tíðindi
**18.40** Ítróttatíðindi
**19.00** V4-dráttur
**19.05** Hans Hedtoft - tað danska Titanic - Frásøgumynd, sum Árni Joensen hevur skrivað eftir bók hjá Thomas Rockwell
**20.00** 15 tær bestu - Niels Uni Dam stílar fyri
**21.00** Harmonikutónar - Flóvin Jacobsen skipar fyri
**21.50** Hetta heilaga evangeliið skrivar - David Johannesen, prestur, leggur til rættis
**22.00** Tíðindi
**22.05** Afturhvarv - Birgar Johannesen og Djóni Andreassen skipa fyri
**01.00** Liðugt

**Sunnudagur 30. november**
**10.00** Tíðindi
**10.05** Sunnudagsløtan - Kári Sólstein og Vivian Gudmundsson stíla fyri
**10.30** Sálmar og sangir (e) - Jógvan við Keldu leggur til rættis
**11.00** Guðstænasta í Nes kirkju - Kirkjan 160 ár. Martin Restorff Jacobsen, prestur, prædikar.
**12.10** Crescendo (e) - Kári Olsen stílar fyri
**13.10** Fransar undir Íslandi - Fyrsti partur av frásøgn um franskan fiskiskap undir Íslandi. Elin Pálmadóttir skrivaði. Árni Joensen føroyskaði.
**13.40** Grýtut grund og vøkur valling - Føroyskir sangir. Janus Mohr leggur til rættis
**14.00** Tíðindini
**14.15** Framvið ánni - Jónheðin H. Tróndheim leggur til rættis
**15.00** Kvøðuljómar
**16.30** Latín (e) - Tónleikasending hjá Heðini Arge
**17.30** Fólk og frítíð (e) - Gunnar Nolsøe stílar fyri
**18.30** Tíðindi
**18.40** Ítróttatíðindi
**19.00** Partita - Kári Olsen, Edvard Nyholm Debess og Ove Olsen leggja til rættis
**21.00** Liðugt

**Mánadagur 1. desember**
**07.00** Tíðindi
**07.05** Morgunlestur - Hans Jørgensen í Miðvági lesur
**07.15** Jólaløtan
**07.30** Tíðindi
**07.35** Góðan morgun Føroyar - Jákup Magnussen er vertur
**08.00** Tíðindi
**08.03** Góðan morgun Føroyar
**09.00** Tíðindi
**09.03** Tilvera: Nú leiti eg til Tína náði (e) - Armgarð Arge leggur til rættis
**09.35** Dagsins tónar
**09.50** Morgunlestur (e) - Hans Jørgensen í Miðvági lesur
**10.00** Tíðindi
**10.03** Fimleikaløtan 3
**10.10** Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm stílar fyri
**12.00** Veðurtíðindi
**12.03** Middagstónleikur
**12.20** Tíðindi
**12.40** Døgurðatónar
**13.00** Tónatímin
**14.00** Hans Hedtoft - tað danska Titanic (e) - Frásøgumynd, sum Árni Joensen hevur skrivað eftir bók hjá Thomas Rockwell
**15.00** Tíðindi
**15.03** Nón - Seinnapartssending við tónleiki, sum Jákup Magnussen stílar fyri
**16.00** Tíðindi
**16.03** 15 tær bestu (e) - Niels Uni Dam stílar fyri
**17.00** Tíðindi
**17.05** Hvat nú? - Elis Poulsen skipar fyri
**18.00** Jólaløtan (e)
**18.25** Skráin og lýsingar
**18.30** Tíðindini
**19.00** Kult - Mentanarreportasja, sum Eyðun Klakstein leggur til rættis
**19.30** Løg mær dámar
**20.00** Kallkyn - Rúni Korsgaard stílar fyri
**20.30** Menniskjan og maktirnar - Høgni Joensen lesur 1. part av framhaldssøgu eftir Olav Duun. Bjarni Niclasen týddi
**21.00** Tíðindi
**21.05** Dagsetur - Rúni Jákupsson skipar fyri
**21.50** Komin er heilaga jólafest - Fyrsta sending við adventssálmum. Johs. Andr. Næs leggur til rættis.
**22.00** Estudio 2000 - Kári Annand Berg ger sendingina
**23.00** Tíðindi

**Týsdagur 2. desember**
**07.00** Tíðindi
**07.05** Morgunlestur - Hans Jørgensen í Miðvági lesur
**07.15** Jólaløtan
**07.30** Tíðindi
**07.35** Góðan morgun Føroyar - Bjarni Mohr er vertur
**08.00** Tíðindi
**08.03** Góðan morgun Føroyar - Bjarni Mohr er vertur
**09.00** Tíðindi
**09.03** Menniskjan og maktirnar (e) - Høgni Joensen lesur 1. part av framhaldssøgu eftir Olav Duun. Bjarni Niclasen týddi
**09.35** Dagsins tónar
**09.50** Morgunlestur (e) - Hans Jørgensen í Miðvági lesur
**10.00** Tíðindi
**10.03** Fimleikaløtan 3
**10.10** Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm stílar fyri
**11.00** Fransar undir Íslandi (e) - Fyrsti partur av frásøgn um franskan fiskiskap undir Íslandi
**11.30** Tónasláttur (e) - Hans Egholm stílar fyri
**12.00** Veðurtíðindi

www.smyril-line.fo



**Søkt verður eftir**
**pakkhúsformanni**

**Uppgávurnar eru:**

- Samskifti og samstarv við leiðaran á terminalinum og farmadeildini.
- Viðlíkahald av útgerð
- Handfaring av farmi og útgerð
- Skjóta fráboðan í sambandi við skaða á farm og útgerð
- Dagføra starvsfólk í pakkhúsinum um virksemi sum er í gongd
- Tryggja trygga goymslu og úrskiljing av vandamiklum vørum
- Uppteljing av farmi







Umsøkjarin skal hava trukkkoyrikort.

Løn eftir avtalu.

Roknast skal við skiftandi arbeiðstíðum.

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Rólant Højsted á tlf. **34 59 76** ella **21 34 65.**

Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi **í seinasta lagi 20.12.03.**

Umsóknir við møguligum prógvum/CV skulu sendast til:

**Smyril Line, Postboks 370,**
**FO-110 Tórshavn,**
**Ella við telduposti til**
**rolanth@smyril-line.fo**

J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo



## Leiðari til Flykruna

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einum dynamiskum umhvørvi. Tú kemur m.a. at taka tær av dagligu leiðsluni, innkeypi, dekoratión og marknaðarrøkt.

Vit vænta, at tú:
- ert ágrýtin
- hevur hug og hegni at veita kundum okkara eina góða tænastu
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- ert álítandi og fyrikomandi

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 28. november 2003.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Flykran
Postboks 1047
110 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Hildigarð Jacobsen á tel. 31 55 65.

Flykran

petur & petur • 320870

**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 29.11. kl. $20^{00}$
Leygardagin 29.11. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 30.11. kl. $19^{30}$
Sunnudagin 30.11. kl. $22^{30}$




Leygardagin 29.11. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 30.11. kl. $19^{15}$




Leygardagin 29.11. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 30.11. kl. $22^{00}$




**Billettprísur: 45,- kr.**
Leygardagin 29.11. kl. $17^{45}$
Sunnudagin 30.11. kl. $17^{15}$

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning**
**Fríggjadagin 05.12.**




**Frumsýning**
Mikudagin 17.12. kl. $18^{00}$
Mikudagin 17.12. kl. $22^{15}$
**Forsølan byrjar mánadagin 01.12. kl. $14^{00}$**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**